# Bøkur neyðugar fyri føroyska samleikan

**Føroysk bókaútgáva er í kreppu, sigur formaðurin í Føroya Lærarafelag. Nýggja samgongan vísir á týdningin av føroyskum bókum fyri samleika okkara og lovar bæta á økinum**

SAMGONGUSKJAL
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Tjóðarsamleikin knýtir føroyska fólkið saman og er orsøkin til, at vit byggja land. Hetta staðfesta nýggju samgonguflokkarnir, men viðganga eisini, at hesin samleiki er undir trýsti. Tí skulu átøk gerast fyri at stimbra og menna tjóðarsamleikan.

Samgongan ætlar mest møguligt at fylgja teimum tilmælum, sum málstevnunevndin setti fram fyri stuttum. Og serligur dentur verðurlagdur á at fáa til vega føroyskt ella føroyskað tilfar til børn og ung.

Týðaragrunnur skal skipast sum ein konta á fíggjarlógini, men verður umsitin av Mentanargrunninum.

Viðtøkurnar fyri grunnin verða endurskipaðar soleiðis, at hann verður rumsáttari og virkisøkið verður víðkað til fleiri listagreinir. Fíggjarlig menningarætlan skal eisini gerast fyri grunnin samsvarandi tí tilmæli, sum gjørt var í upprunauppskotinum fyri grunnin.

Magnus Tausen, formaður í Lærarafelagnum, kemur annars í nýggjari grein í skúlablaðnum við hvøssum atfinningum at førda skúlabókapolitikkinum.

Hann staðfestir, at játtanin til Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur staðið í stað tey seinastu 20 árini. Játtanin er 1,1 millión um árið, men tá ið lønir og samsýningar eru tvífaldað hesi árini, er støðan hjá Bókadeildini vónleys, sigur Magnus Tausen.

Hann vísir á at bøkur hava avgerandi týdning fyri málmenningina, men eisini geva annað og meira enn málsliga barlast, táið foreldur t.d lesa saman við børnum sínum.

Tí hevur bókaútgáva stóran týdning, sigur hann at enda í greinini í Skúlablaðnum.

# Búskaparpolitikkur skal hava fastari grund

CHE-samgonguskjalið staðfestir, at føroyski búskapurin hevur stórar avbjóðingar í løtuni. Ein av loysnunum eru langtíðarfíggjarætlanir fyri allan rakstur og løgur

SAMGONGUSKJAL
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Fleiri politiskar ætlanir fyriliggja í skjalinum, men sagt verður, øll átøkini eru bundin at fíggjar- og búskaparstøðuni.

Komandi fíggjarmálaráðharrin, Karsten Hansen, segði við Rás2 í gjár, at hann ætlaði at føra ein varnan búskaparpolitikk.

- Øll vita, at ein króna kann ikki brúkast tvær ferðir, og um pengar ikki eru, verða átøk ikki sett í verk, segði hann.

Samgongan bindur seg í samgonguskjalinum til at reka ein ábyrgdarfullan fíggjar- og búskaparpolitikk og fremja neyðugar bygnaðarbroytingar, har lagt verður upp fyri sveiggjum í búskapinum og neyvt tamarhald er á øllum útreiðslum.

Millum ítøkiligu átøkini, sum verða nevnd í skjalinum er ein endurskoðan av játtanarskipan landsins, har langtíðarfíggjarætlanir verða gjørdar fyri allan rakstur og løgur.

Búskaparráðið og onnur hava í fleiri ár víst á, at hagtalsgrundarlag undir føroyska búskaparpolitikkinum manglar, og at politikarar tí, sum stjórin í Suðuroyar Sparikassa segði í tíðargrein í Sosialinum herfyri, stýra í blindum.

Hetta ætlar nýggja samgongan at gera nakað við. Hagtalsgrundarlag skal fáast til vega, og tjóðarroknskapurin skal dagførdast sambært OECD-leisti.

Altjóða stovnar skulu eisini gera regluligar dygdarmetingar av føroyska búskapinum, og funktiónirnar fyri fíggjarstýring og tænastur hjá tí almenna skulu samskipast.

Bindandi árligar avtalur ímillum land og kommunur um íløgu- og rakstrarkarm og

felags fíggjarstýring og roknskaparreglur fyri land og kommunu eru eisini nevnd í í skjalinum.

# Sosialir reformar hægstu raðfesting

**Samgonguskjalið hjá CHE-samgonuni hevur sett sosialar reformar, sum „skulu tryggja teimum við størsta tørvinum javnbjóðis møguleikar fyri einum virknum lívi“ ovast á breddan**

SAMGONGUSKJAL
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Tá ið nýggja samgongan legði samgonguskjalið fram í gjár, segði Løgmaður, at eitt av fremstu málunum hjá nýggju samgonguni er at skapa neyðugu lógarkarmarnir fyri at øll í Føroyum hava nøktandi rættartrygd, eisini tey minni mentu.

Og samgonguskjalið hevur sum fyrst punkt:

- Sosialir reformar skulu tryggja teimum við størsta tørvinum javnbjóðis møguleikar fyri einum virknum lívi

Í útgreinandi partinum stendur millum annað, at námsserfrøðiliga ráðgevingin kring landið verður styrkt, Skúlin á Trøðni verður umskipaður og styrktur í samráð við leiðslu, starvsfólk og foreldur at børnum, sum ganga á skúlanum, og greiningarmiðstøð fyri børn við serligum tørvi verður skipað.

Ein av stóru trupuleikunum hjá foreldrum at børnum við serligum tørvi hevur verið, at tann vitan og stuðul, sum hevur ligið í barnagørðunum ikki hevur fylt við í skúlan. Hetta tekur nýggja samgongan hædd fyri, og dagstovnaøkið verður nú lagt undir mentamálaráðið til tess at skapa eitt heildartilboð til børn undir- og í skúlaaldri

Sosialpolitiskur reformur skal eisini gerast við nýggjari sosiallóggávu. Og nýggj føroysk forsorgarlóg, sum fremur rættartrygd og gjøgnumskygni, verður smíðað. Hetta er eitt av teimum málinum, sum felagið Javni hevur gjørt vart við í seinastuni, og greinar í Sosialinum hava víst á, hvussu avolda okkara forsorgarlóg er.







FØRARAR TIL BETONGBILAR

J & K Betong søkir eftir førara til betongpumpubil og betongbil.
Talan er um krevjandi arbeiði og roknast kann við nógvari yvirtíð.
Tann, ið settur verður, kann byrja beinanvegin, men vit eru tilreiðar at bíða eftir rætta persóninum.

Løn sambært avtalu.

Sendið umsóknina til adressuna niðanfyri, stílað til Arngrim Arngrimsson, blandimeistara, í seinasta lagi mikudagin 6. februar.
Spurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast Arngrími á tel. 585025.

J&K

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn
tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: betong@jkp.fo |
www.jkp.fo | Blandimeistarin tel 58 50 25

J & K Betong